# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 17.02.2020 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **Umsókn um byggiloyvi til neyst í Nesi frá felagnum Lítla Dímun.**
   Søkt verður um byggiloyvi til neyst á havnalagnum í Nesi. Ætlanin hjá felagnum er at yvirtaka neystagrundir, ið byggjast skal á. Jens Christian hevur málsviðgjørt byggimálið og felagið hevur m.a. fingið upplýst, at byggiloyvi ikki kann verða givið endaliga, fyrrenn eigaraviðurskiftini eru avgreidd.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt .

2. **Góðkenning av roknskapi 2019 hjá Hvalbiar skúlabókasavni.**
   Roknskapurin hjá bókasavninum javnvigar við kr. 46.090,00.
   **Trivnaðarnevndin 14.02.2020**:
   Nevndin hevur undirskrivað roknskapin.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at góðkenna roknskapin hjá Hvalbiar skúlabókasavni 2019.

3. **Tilboð uppá trygdarútgerð og navna-/nummarspjøldur.**
   Bærendsen Teknik, Tangavirkið og S.J.H.Commercial Divers eru spurd um tilboð uppá nummar-spjøldur og trygdarútgerð til bátahylin.
   Innkomið tilboð navna-/nummarspjøldur:
   S.J.H. Commercial Divers kr. 26.900,00 uttan MVG.
   Innkomin tilboð trygdarútgerð:
   S.J.H. Commercial Divers: kr. 22.800,00 uttan MVG
   Gummibátatænastan: kr. 17.244,00 uttan MVG.

**Vega- og havnanevndin 13.02.2020:**
Nevndin mælir til at kanna, um aðrir veitarir gera slík navna-/nummarspjøldur. Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum uppá trygdarútgerð frá Gummibátatænastuni kr. 17.244,- uttan MVG.
**Fíggjarnevndin 17.02.2020:**
Málið útsett vegna vantandi tilboð.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Vega- og havnanevndini.

4. **Tilboð uppá boylar til stigar á bryggjuni í Sandvík.**
Innkomið tilboð frá Bærendsen Teknik á kr. 13.800,00 uttan MVG. Onki tilboð kom frá Tangavirkinum.
**Vega- og havnanevndin 13.02.2020:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Bærendsen Teknik kr. 13.800,00 uttan MVG.
**Fíggjarnevndin 17.02.2020:**
Nevndin er samd um at taka støðu á bygdarráðsfundinum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Vega- og havnanevndini og taka av tilboðnum frá Bærendsen Teknik kr. 13.800,00 uttan MVG.

5. **Innkomin tilboð uppá talvu v.m. til kampingøkið.**
Trý tilboð eru innkomin uppá 9 stk. CCE stikk, el-talvu og káplar.

| | |
|---|---|
| SIMO Sp/f: | kr. 9.500,00 uttan MVG |
| MR-EL Sp/f: | kr. 18.950,00 uttan MVG |
| Groth Electric Sp/f: | kr. 15.020,00 uttan MVG |

**Fíggjarnevndin 17.02.2020:**
Samtykt varð einmælt at mæla bygdaráðnum til at taka av tilboðnum frá SIMO kr. 9.500,00 uttan MVG.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

6. **Innkomið tilboð uppá 20 stk. gøtuljós.**
Tilboð innkomið frá Bærendsen Teknik Sp/f uppá 20 stk. gøtuljós, alt íroknað - kr. 155.600,00.
**Tekniska nevnd:**
Nevndin hevur ikki havt møguleika at viðgera málið.
**Fíggjarnevndin 17.02.2020:**
Einmælt samtykt at mæla til at taka av tilboðnum frá Bærendsen Teknik.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

7. **Játtan til byrjanarsamrøður og tilfarið TÍTT á dagstovnaøkinum.**
   Skriv frá dagstovnaleiðaranum í sambandi við, at stovnarnir í Suðuroynni ætla at byrja arbeiðið við byrjanarsamrøðum og tilfarinum TÍTT, har øll starvsfólkini fáa undirvísing í hesum. Metti kostnaðurin fyri hetta er kr. 20.000,00.
   **Trivnaðarnevndin 14.02.2020:**
   Nevndin mælir til at játta dagstovninum umleið kr. 20.000,00 til hesa verkætlan.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at játta hesum.

8. **Skriv viðvíkjandi vegnum vestur á Drátt.**
   Skriv vegna jarðaeigararnar í Heiðunum og á Drátti, har ynskt verður, at kommunan ger ábøtur á vegin.
   **Vega- og havnanevndin 13.02.2020:**
   Nevndin hevur verið á staðnum og er komin til ta niðurstøðu er, at uppdyrkingingarvegurin, ið bert verður nýttur til traðir, kann nýtast sum hann er.
   Nevndin mælir sostatt til, at kommunan ikki ger nakrar ábøtur á vegin nú.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

9. **Skriv viðvíkjandi trupulleika av vatni omanfyri hús.**
   Skriv frá borgarum, har boðað verður frá trupulleikum av vatni omanfyri húsini.
   **Tekniska nevnd :**
   Niels Olaf greiddi frá, at tað nógva regnið, sum er og veitir, ið ikki verða tiknar upp, geva trupulleikar.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at senda Vatnsýnisnevndini málið til viðgerðar.

10. **Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.40

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen Rúni Thomsen Sten Spange Larsen